# Arnold koyrir fólk til hús

Tá hann var filmsleikari, var tað at kalla einki, sum kundi fáa Arnold Schwarzenegger at missa pippið, men sum guvernørur í Kalifornia hevur hann fingið at síggja, at politiskar avleiðingar eru annað enn gjørdar avbjóðingar í filmi. Fyri stuttum mælti hann til at gera tað lógligt at selja hash, so tosaði hann um at selja autografar, og nú hevur hann gjørt av at skerja arbeiðstíðina hjá almennum starvsfólki fyri at spara lønarútreiðslur. Við einum pennastroki hevur guvernørurin stongt allar almennar skrivstovur fýra dagar um mánaðin, og tað hevur kostað starvsfólkinum 15 prosent av lønini.



# Írland tekur fangar úr Guantanamo

Írska stjórnin kunngjørdi um vikuskiftið, at Írland er sinnað til at taka ímóti tveimum fangum úr Guantanamo-leguni í Kuba. Einki varð sagt um, hvørjir fangarnir eru, men ætlandi verða teir fluttir til Írlands um einar tveir mánaðir. Amerikanski sendiharrin í Dublin, Don Roony, segði í gjár, at hann hevði fingið boðini frá írska forsætisráðharranum, Bertie Ahern. Sum skilst er tann írska tilsøgnin komin í lag, eftir at ein írsk sendinevnd hevur verið í USA og tosað um málið. Bertie Ahern hevur fyrr sagt, at hann er fegin um avgerðina hjá Barack Obama, forseta at lata fangaleguna í Guantanamo aftur.



*Í ár hava nógv fleiri søkt enn vanligt, og tá hækka krøvini av sær sjálvum, sigur Holger Arnbjerg*

*Savnsmynd*

**FAKTA**

**Hesir útbúgvingarstovnar í Danmark krevja omanfyri 10 í miðal:**

- International Business, Handelshøjskolen í Keypmannahavn: 10,9
- Psykologi, Københavns Universitet: 10,5
- HUMBAS+journalistik, Roskilde Universitet: 10,5
- Statskundskab/samfundsfag, Københavns Universitet: 10,5
- Lægevidenskab, Københavns Universitet: 10,3
- International Business and Politic, Handelshøjskolen í Keypmannahavn: 10,3
- Veterinærmedicin, Københavns Universitet: 10,0

# Fáa svar í dag

**Hundraðtals føroyingar fáa í dag svar frá útbúgvingarstovnum, um tey eru slopppin inn, men eitt gott prógv er ikki garantur fyri hesum, tí fleiri stovnar niðri krevja omanfyri 10 í miðal**

ÚTBÚGVING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tá føroyingar leita sær út í heim í útbúgvingarørindum, er Danmark best umtøkta landið. Sambært Holger Arnbjerg, leiðara á Altjóða Skrivstovuni, eru tað umleið 900 føroyingar, ið lesa niðri, og í ár er einki undantak í so máta, at nógvir føroyingar hava søkt um at sleppa inn á danskar útbúgvingarstovnar.

- Men í ár hava nógv fleiri søkt enn vanligt, og tá hækka krøvini av sær sjálvum, sigur Holger Arnbjerg. Hetta merkir víðari, at nógv fleiri verða avvíst enn vanligt – eisini fleiri føroyingar.

### Herd krøv

Eitt yvirlit á heimasíðuni hjá Den Koordinerede Tilmelding, sum samskipar allar hægri útbúgvingarstovnar í Danmark, staðfestir, at fleiri stovnar krevja ein miðalkarakter, sum er omanfyri 10.

International Business á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn krevur eitt prógv, har miðalkarakterurin er 10,9. Journalistik á humanistisku linjuni á Roskilde Universitet krever 10,5, og hetta sama er galdandi fyri Psykologi og Samfelagsfrøði á Københavns Universitet.

### Trý ár kosta dýrt

Ein orsøk til herdu krøvini er, sum áðurnevnt, at talið av umsóknum er methøgt. Ein onnur og minst líka avgerandi orsøk er, at skipanin fyri at søkja er broytt í mun til undanfarin ár.

Tey, sum fara undir hægri lesnað áðrenn tvey ár eru liðin síðani tey fingu miðnámsprógv, sleppa at falda sín karakter við 1,08. Tað merkir, at hevði tú níggju í miðal í fjør, so hevur tú 9,72 í miðal, um tú søkir í ár.

Henda fyrimun fáa tey ikki, sum hava arbeitt ella hildið hátt hildið trý sabbatár, og tað kostar dýrt.

### Restpláss

Ert tú ein teirra, sum hevur fingið boð um, at tú ikki ert sloppin inn á ynskiútbúgvingarstovnin, er ikki at falla í fátt.

- Tað eru ikki allar dyr stongdar enn, tí hóast nógv er upptikið, so eru framvegis pláss á ávísum stovnum, bæði í Danmark og Stórabretlandi, sigur Holger Arnbjerg, og nevnir hann eitt nú samfelagsligu linjuna á Roskilde Universitet, sum eitt stað, har tað ber til at søkja um restpláss.



Starvsfólk til

Føroya landsbókasavn

Søkt verður eftir

**Avloysara** fyri skrivara í farloyvi frá 1. september 2009 til 31. juli 2010

**Hjálparfólki** í tíðaravmarkað starv frá 1. september 2009 til 31. december 2009

Umsóknarfreist 14. august 2009

Les meira á www.flb.fo